Vælkomin til Læraradagin!
Í ár er heitið á ráðstevnuni „Lærdómur er lættur at bera“. Vit skipa dagin við felags framløgum og verkstovum, ið seta fokus á læring í 21. øld.

Tað er okkara vón, at dagurin fer at geva tykkum íblástur og brynja tykkum til tær avbjóðingar og møguleikar, ið tykkara gerandisdagur í føroysku skúlaskipanini bjóðar.

“

*Undirvísing er ikki at fylla eina spann, men at tendra ein neista.*

**PLUTARCH / W. B. YEATS**

*Skúlin er staðið, har vitan breiðir seg frítt. Har mentan verður skapað og ment av nýggja ættarliðnum í samspæli við tað, sum longu er.*

**LENE TANGGAARD**

Læraradagur

# LÆRDÓMUR ER LÆTTUR AT BERA

*Læring í 21. øld*

NÁM

# SKRÁ

| | |
|---|---|
| 8:00 | **Innskriving og morgunmatur** |
| 9:00 | **Vælkoma** |
| 9:30 | **Fyrilestur 1**<br>At læra fyri at liva í 21. øld<br>Lene Tanggaard (DK) |
| 10:15 | **Kaffisteðgur** |
| 10:45 | **Fyrilestur 2**<br>Um sansaupplivingar í læring<br>Theresa Schilhab (DK) |
| 11:30 | **Døgurðasteðgur** |
| 12:30 | **Verkstovur 1–5** |
| 13:15 | **Kaffisteðgur** |
| 13:45 | **Fyrilestur 3**<br>Arbeiðsminni<br>Michael Wahl Andersen (DK) |
| 14:30 | **Hugleiðing og skemt**<br>Jensina Olsen |
| 14:50 | **Samanumtøka** |

# FYRILESTRAR

**„At læra fyri at liva í 21. øld“**(fyrilestur 1)
*Lene Tanggaard (DK), professari í sálarfrøði, ph.d.*
Lene Tanggaard er professari í sálarfrøði, ph.d. og rektari á Designskolen Kolding. Hon er íðin kjakari og hevur skrivað fleiri bøkur, har hon viðger útbúgving og skúlaskap.
Í fyrilestrinum viðgerð Lene Tanggaard førleikar, ið framtíðin væntandi fer at krevja av teimum ungu. Serliga fer hon at leggja dent á skapandi lærutilgongdir, sum snúgva seg um at seta spurningar, at undrast, at kanna o.s.fr.

**„Um sansaupplivingar í læring“** (fyrilestur 2)
*Theresa Schilhab (DK), professari, neurobiolog, ph.d.*
Theresa Schilhab er professari í neurobiologi, heimspekingur, ph.d. og er knýtt at Aarhus Universitet. Í løtuni er hon m.a. granskingarleiðari á verkætlanini naturligteknik.dk, ein verkætlan, sum kannar tøkninýtsluna hjá børnum í mun til náttúruupplivingar.
Fyrilesturin hjá Theresu Schilhab snýr seg um, hvønn týdning sansaupplivingar hava fyri læring.

**„Arbeiðsminni“** (fyrilestur 3)
*Michael Wahl Andersen (DK), lektari í støddfrøði og sálarfrøði*
Michael Wahl Andersen er lektari í støddfrøði og sálarfrøði á Københavns Professions Højskole. Hann hevur skrivað fleiri bøkur um týdningin av fakligari lesing og arbeiðsminni, serliga í støddfrøði.
Michael Wahl Andersen fer í fyrilestrinum at greiða frá, hvussu arbeiðsminni sum hugtak kann skiljast, og hvønn týdning tað hevur fyri læring.

# VERKSTOVUR

**„Náttúruupplivingar og tøkni“** (verkstova 1)
*Theresa Schilhab (DK), professari, neurobiolog, ph.d.*
Nýggj heilagransking vísir, at hugsan og vitan í stóran mun eru grundaðar á ítøkiligar kropsligar og sosialar upplivingar. Komið verður inn á munin millum upplivingar av menniskjaskaptum lutum og av náttúruni, og hvørja ávirkan vaksandi nýtslan av tøkni hevur á læring og hugsan.

**„Faklig lesing í støddfrøði“** (verkstova 2)
*Michael Wahl Andersen (DK), lektari í støddfrøði og sálarfrøði*
Tosað verður um, hvat lesing og faklig lesing snúgva seg um, og eisini hvussu undirvísingin kann skipast, fyri at næmingar gerast til virknar lesarar, tá teir lesa í støddfrøðibókum.

**„Kropsligar rørslur og læring“** (verkstova 3)
*Súni Olsen (FO), fólkaskúlalærari*
Tosað verður um, hvussu kropsligar rørslur og læring kunnu samvirka. Komið verður bæði inn á ástøðiligar hugleiðingar og niðurstøður og á praktiskar upplivingar og royndir á økinum.

**„Avbjóðingar hjá lesiveikum næmingum í undirvísingini“** (verkstova 4)
*Fríðbjørg Hammer (FO), fólkaskúlalærari*
Greitt verður stutt frá ástøði um lesing og lesitrupulleikar. Eisini verður komið inn á týdningin av testum, og hvussu tær kunnu knýtast til sjálva undirvísingina.

**„Norð“** (verkstova 5)
*Camilla Hübbe (DK), rithøvundur*
Fyrst verður greitt frá skaldsøguni „Norð“ og serliga umhvørvinum í søguni. Eftir hetta verður høvi at arbeiða við hugskotum um, hvussu ein sjálvur kann arbeiða við samvirknu skaldsøguni í undirvísingini.